# Badmintonhøllin skal lata aftur klokkan 02.00



*Badmintonhøllin hevur nú fingið boð um, at tá dansur er í høllini skal hann enda klokkan 2 og ikki klokkan 4 sum alla aðrastaðni*

**Býráðið hevur gjørt av, at tá dansur er í Badmintonhøllini í Havn, skal dansurin enda klokkan tvey. Aðrastaðni er dansurin heilt til klokkan 4, meðan Badmintonhøllin sum tann einasta skal lata aftur klokkan tvey. Fyrireikarar meta, at tað verður ikki møguligt at halda fram við at skipa fyri tiltøkum undir slíkum umstøðum**

DANSUR
*Ingrid Bjarnastein*

Nú skal dansurin enda klokkan 2 ístaðin fyri klokkan hálvgum fýra. Hetta eru grannarnir hjá Badmintonhøllini, fyrireikarar, løgreglan og býráðið komin ásamt um á fundi.

Sjálvt um hetta skal vera ein semja millum partarnar, hava fyrireikararnir ilt við at síggja, hvussu tað nú skal loysa seg at hava dans í Badmintonhøllini.

– Eg veit ikki, hví býráðið hevur sagt, at dansurin skal enda klokkan tvey. Vit hava bara fingið eitt bræv, har tað stendur, at dansurin skal enda tá. Vit hava fyrr fingið nógvar átalur um, at høllin ikki er egnað til slík tiltøk, og tað er so at siga rætt nokk, sigur Mark Joensen, sum er ein av fyrireikarunum fyri dansi í Badmintonhøllini.

Mark Joensen sigur, at hann sum fyrireikari metir tað ikki loysa seg at halda áfram við dansi í høllini, tá tað skal enda klokkan 2.

– Um tað er barnadiskotek, so kanska, men ikki um tað er til tey ungu beint undir 18 ár. Eg havi tosað við aðrar fyrireikarar, og teir meina tað sama.

### Onki val

Fyriskipararnir hava onki annað val enn at lata dansin enda klokkan 2. Eitt skriv er komið frá fútanum, har afturlatingartíðin er sett til klokkan tvey.

– Tað er reitt sindur órættvíst, at tað er bara Badmintonhøllin, sum skal lata aftur klokkan 2, tá øll hini plássini kunnu hava opið til klokkan 4, heldur Mark Joensen. Hann leggur afturat, at sjálvur hevur hann ongar trupulleikar við at taka sítt virksemi út um Havnina og fara út á bygd at hava dans, men hetta kann gerast keðiligt hjá teimum ungu og foreldrum teirra.

– Eg havi sjálvur ung børn, og eg eri ikki so heitur fyri at skula senda tey út á bygd hvørt vikuskifti í dans. Eg skal bara svara fyri mín part, men eg haldi ikki, at nakar fer at tíma at koma í dans, tá tað skal enda so tíðliga, sigur Mark.

Jan Christiansen, borgarstjóri, sigur, at afturlatingartíðin var ásett tí so nógv óskil hevur verið kring badmintonhøllina.

– Tað fyrsta, sum varð gjørt var at seta eitt aldursmark á, at tað vóru bara børn, sum eru 14 ár og eldri sum sleppa inn. Foreldur hava sent klagur um, at tey fáa ikki børnini heim aftur. Tað verið seg børn, sum eru 11-12 ára gomul, sigur Jan Christiansen. Borgarstjórin vísir á, at hetta er bert ein royndartíð, sum í fyrsta umfari er sett til apríl 2003.

– Eg eri samdur í, at hetta er ein undarlig støða, at man ikki kann hava eitt dansistað til ung undir 18, men eg meti ikki, at tað liggur á kommununi at skula skipa fyri dansi, heldur Jan Christiansen.

Tá royndartíðin er yvirstaðin verður støðan tikin upp til eftirmeting, og um haldast skal fram á sama hátt ella um hetta skal aftur broytast.

Jan Christiansen sigur, at tað kann væl vera, at støðan verður tikin upp til eftirmeting fyrr, og tað kann eisini væl vera, at tað verður seinni. Alt eftir, hvussu gongur.

– Nú mugu vit fyrst hava ein dans at meta okkum eftir, sigur Jan Christiansen at enda.

# Tónleikacafé á Platform

**Hósdagin verður tónleikacafé á Platform í Havn í sambandi við nýggjar útgávur frá Studio Pegasus**

ÚTGÁVUR

Hesa vikuna kemur Studio Pegasus við tveimum nýggjum útgávum, og í tí sambandi verður tónleikacafé og móttøka á Platform seinnapartin hósdagin.

Onnur útgávan er ein videofilmur um Brand Enni. Upptøkutól hava fylgt unga tvørámanninum, síðani upptøkurnar byrjaðu til fyrstu fløguna hjá honum, og á nýggja videofilminum ber til at koma heim til Brand, fylgja honum á ferð uttanlands og á palli í Føroyum.

Hin útgávan er árbókin Tónleikur 2002, sum greiðir frá øllum tí, sum er hent innan føroyskan tónleik farna árið. Í bókini eru hópin av myndum, sum ikki hava verið frammi áður. Eyðun Klakstein og Steintór Rasmussen hava lagt útgávuna til rættis.

Á caféini hósdagin verður nýggi videofilmurin sýndur á stórskíggja, og Brandur fer eisini at syngja nakrar sangir saman við sínum tónleikarum. Haraftrurat fer hann at signera nýggja filmin.

Opið verður á Platform hósdagin 5. desember frá klokkan 15.00 til 17.00.

Jólatilboð:
Danmark
frá 1.955,-
Keypmannahavn frá kr. 1.955,- t/r
Billund frá kr. 1.993,- t/r
Spyr eisini um prísir til Odense, Århus og Aalborg.
Ferðatíðarskeiðið er frá 10. desember 2002 til 5. januar 2003.
Ferðaseðlar skulu keypast í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð.
Serligar treytir eru galdandi fyri hesar ferðaseðlar og avmarkað pláss er á hvørjum túri. Nógvur barnaavsláttur verður givin.
Vend tær til tína ferðaskrivstovu
ella Maersk Air tlf. +45 70 10 74 74
MAERSK AIR
It's got to be perfect

# Seinasti møguleiki at síggja Ginusøgur

**Nógv umtalaði leikurin Ginusøgur hjá Grímu kemur nú aftur til Havnar, og hava tey, sum enn ikki hava sæð leikin, enn ein seinasta møguleika til at síggja hann**

SJÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

»Leikurin, sum øll hata at elska, og summi elska at hata kemur aftur til Havnar«, sigur Gríma í tíðindaskrivi.

Tað eru ikki nógvir sjónleikir í Føroyum, sum hava fingið so nógva umtalu sum Ginusøgur.

– Summi fáa ilt av tí tey ikki hava sæð, summi fáa ilt bara av plakatini, meðan tey flestu, sum hava sæð leikin, ongastaðni fáa ilt, siga tey frá Grímu.

Og hóast tey nógvu mótmælini, hevur leikurin gingið fyri fullum húsum, fyrst í Havn, og síðani um meginpartin av landinum.

Yvir 4000 fólk hava higartil sæð leikin, og eftirspurningurin minkar ikki, so nú verður leikurin uppafturtikin á Gamla Meiarínum. Fyribils eru fýra sýningar settar á skránna. 5. og 6. desember klokkan 20 og 7. og 8. desember klokkan 18. Er undirtøkan nóg stór, verður møguliga hildið fram.



# VARPIÐ – nýtt sjónvarps og útvarpsinnlegg

**Blaðið verður prentað á sterkari pappír, verður eitt sindur minni enn Sosialurin, og tað verður heft. Blaðið hevur allar rásirnar hjá Televarpinum og harvið eisini so at siga allar hjá CanalDigital**

BLAÐ
*Eirikur Lindenskov*

Sosialurin hevur gjørt eitt nýtt sjónvarps- og útvarpsblað, nevnt VARPIÐ, sum verður at fáa saman við Sosialinum hvønn fríggjadag. Fyrsta VARPIÐ verður at fáa við fríggjadags Sosialinum, sum verður at fáa í annaðkvøld.

Sosialurin hevur leingi havt ætlanir um at bøta um Hygg og Hoyr, sum hevur verið í Sosialinum í nógv ár. Javnan hava fólk heitt á okkum um at fáa aðrar rásir við, enn tær, sum Rás Tórshavn hevur víst.

Tá nú Televarpið er farið at senda, og Rás Tórshavn er farin í søguna, hava vit samstundis nýtt høvi at gera broytingarnar.

Í blaðnum verða skráir fyri allar rásirnar, sum Televarpið sendir – og samstundis fáa øll onnur, ið hava parabolsjónvarp gleði av blaðnum, tí tey mongu, ið eitt nú hava hald frá CanalDigital, síggja so at siga allar rásirnar, ið Televarpið hevur á síni skrá.

Blaðið verður ikki ein partur av Sosialinum, soleiðis sum Hygg og Hoyr hevur verið, men blaðið verður prentað fyri seg. Tað verður prentað á tjykkri pappír til tess at økja um góðskuna. Eisini verður blaðið skorið, so tað verður eitt sindur minni enn Sosialurin, og tað verður heft í rygginum.

Sostatt er talan um eitt blað, sum verður tikið úr Sosialinum og sum kann liggja á borðinum framman fyri sjónvarpið alla vikuna – og tú kanst fylgja við, hvat ið sent verður á øllum rásunum.

Sjónvarp Føroya, Útvarp Føroya, Rás2 og Lindin verða sjálvsagdur partur av blaðnum, sum eisini hevur umrøður av ávísum sendingum og filmum.




*Fyrsta VARPIÐ verður at fáa í Sosialinum í morgin*

# Stóra Marko 2002 sølustevnan í Runavík

**– Breið umboðan er við á stevuni – alt frá flogferðaseðlum, sjónvørpum og seymimaskinum til snellur og klædnavørur, sigur Ian Højgaard, sum samskipar sølustevnuna fyri fótbóltsfelagið hjá NSÍ**

SØLUSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*



*Leygardagin og sunnudagin verður ítróttarhøllin í Runavík karmur um Marko 2002 sølustevnuna*

Leygardagin og sunnudagin verður stór sølustevna í ítróttarhøllini í Runavík. Hetta er ein afturvendandi stevna við stórum útboði av ymiskum vørum úr stórum parti av landinum.

Eini 2.000-3.000 fólk plaga at vitja inn á gólvið í ítróttarhøllini hesar dagar, stevnan er, og hesa ferð kann tað rættiliga fara at loysa seg.

Umframt tað, at tú kanst gera eitt gott keyp, eru øll seld atgongumerki eisini við í lutakasti um tveir góðar høvuðsvinningar, umframt aðrar vinningar, sum handlarnir lata.

Leygardagin, tá ið opið verður frá kl. 14-22, eru øll seld atgongumerki við í lutakastinum um ein a-pex ferðaseðil, ið er høvuðsvinningurin hendan dagin.

Sunnukvøldið verður eisini ein høvuðsvinningur á skránni, og tá verður drigið millum seld atgongumerki bæði leygardagin og sunnudagin. Høvuðsvinningurin hendan dagin verður eitt wide screen sjónvarp frá Opus, sum er vert 25.000 kr.

Sunnudagin letur sølustevnan upp kl. 15, og hon endar kl. 21.45.

### Setan og undirhald

Tað er fótbóltsfelagið NSÍ, sum skipar fyri stevnuni, Marko 2002, og Ian Højgaard er maðurin, sum hevur tikið sær av samskipingararbeiðnum.

Hann sigur, at 28 framsýnarar verða við, og hetta eru handlar og fyritøkur, sum umboða nógvar ymiskar vørur og tænastur.

– Her verður alt frá flogferðaseðlum, sjónvørpum og seymimaskinum til snellur og klædnavørur. Nevnast kann, at Kall eisini verður við, sigur Ian Højgaard.

Framsýnararnir sleppa inn í høllina at rigga til fríggjamorgunin kl. 10, og tá verður borðreitt við kaffi, smyrjibreyði og køkum.

Klokkan 15 leygardagin setir Rodmundur Nielsen, býráðsformaður í Runavíkar kommunu, stevnuna.

Báðar stevnudagarnar verður ymiskt undirhald á skránni.

Leygardagin kl. 16 vitja Fjotti og Gandakallurin, og kl. 19 verður mótaframsýning, har handlar, sum eru við á stevnuni, sýna fram sínar klædnavørur á pallinum. Sama kvøld kl. 20 syngur Magni Christiansen.

Ian sigur, at Angela og Hannibal verða á pallinum sunnudagin kl. 16 ella 16.30, og beint eftir verður aftur mótaframsýning.

Jens Marni og Kim syngja kl. 19, og kl. 20 verður aftur mótaframsýning.

At enda sunnukvøldið verður drigið um stóra høvuðsvinningin.

### Stór matsøla

Ian sigur, at fótbóltsfelagið hjá NSÍ hevur lagt dent á, at tey, sum støkka inn á gólvið, skulu hava gott pláss – og sleppa at seta seg niður, um tey ynskja tað.

– Á allari stevnuni verður eisini stór og væl pyntað matsøla. Hinvegin hava framsýnararnir høvi at eta ókeypis við einum serligum matkorti, sigur hann.

At enda sigur samskiparin, at millum 2.000 og 3.000 fólk plaga at vitja sølustevnuna í Runavík, og hann vónar, at stevnan hesaferð fær eins góða undirtøku og undanfarin ár.